# Eiðis skúli

## Námsfrøðilig størv í Eiðis skúla skúlaárið 2025-2026

- Søkt verður eftir 2 námsfrøðiligum stuðulsfólkum at starvast 880 árstímar (lønarbrot 0,5). Størvini eru tíðaravmarkað skúlaárið 2025-2026.
  Tað er ein fyrimunur, um umsøkjarin er námsfrøðingur og/ella hevur viðkomandi arbeiðsroyndir.

  Arbeiðsuppgávurnar eru m.a. at stuðla næmingi/um í flokkunum og einsæris.

**Tey, ið sett verða skulu:**

- virka eftir endamáli skúlans, ið er *trivnaður, ábyrgd og læra*
- undir ábyrgd leiðslunnar taka lut í dagliga arbeiði skúlans
- duga at samstarva
- vera fús at taka á seg tær uppgávur, ið eru í skúlanum
- vera við til áhaldandi at menna skúlan
- vera stundislig og nærløgd

**Lønar – og setanartreytir:**

Størvini eru sáttmálasett størv sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálaráðið.

Námsfrøðingar verða løntir í lønarflokki 11 – 24.
Hjálparfólk verða lønt í lønarflokki 3 – 9.

Tey, ið sett verða, eiga at tola broytingar starvinum viðvíkjandi.

Barnaváttan verður kravd í samband við setanina.

Meira kann fáast at vita um starvið frá skúlastjóranum Tom Joensen á tel. 740470.

Umsóknir, saman við c.v. og prógvum skulu vera skúlastjóranum í hendi í seinasta lagi hósdagin 15. mai 2025 kl. 12.00. Umsóknir kunnu sendast til tom.joensen@skulin.fo. ella Eiðis skúli, Kolsvegur 8, 470 Eiði.

**Eiðis skúli**
**Kolsvegur 8**
**470 Eiði**

---

Eiðis skúli hevur forskúla umframt undirvísing í 1. – 7. árgangi. Skúlin hevur góðar umstøður til næmingar og starvsfólk. Les meira um okkum á www.eidisskuli.fo